# EFTIRLØNAR- OG TRYGGINGARAVTALA

**millum**

**Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya**

**og**

**NordikPENSJÓN**

## INNGANGUR

**§ 1 Avtalupartar**

Stk. 1 Hendan avtalan um eftirlønaruppsparingar og tryggingar er gjørd millum **Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya, Postboks 1376, FO-110 Tórshavn**, hereftir nevnt BLF og **NordikPensjón, v/BankNordik, Oknarvegur 5, 100 Tórshavn (V-tal 322059)**, hereftir nevnt NordikPensjón.

**§ 2 Gildiskoma og uppsøgn**

Stk. 1 Avtalan kemur í gildi tann 1/7 2016 og er bindandi fyri eitt ár í senn. Avtalan heldur áfram til hon verður uppsøgd av øðrum avtalupartinum. Uppsøgnin skal verða skrivlig og við í minsta lagi 2 mánaðar freist til endan á einum árið.

Stk. 2. Verður avtalan uppsøgd, hava teir BLF-limir, ið hava tekna avtalu sambært hesum sáttmála, rætt til at halda fram við teirra tryggingar- og/ella pensjónsavtalum, teir hava við NordikPensjón. Eru omanfyri 25 limir, sum hava teirra tryggingar- og/ella pensjónsavtalu við NordikPensjón, varveita hesir somu treytir og prísir smb. hesum sáttmála, um avtalan verður uppsøgd.

Eru undir 25 limir, sum hava teirra tryggingar- og/ella pensjónsavtalu við NordikPensjón, verða gjøld og treytir broytt, so tey samsvara við gjøld og treytir fyri einstaklingar.

**§ 3 Limir fevndir av avtaluni**

Stk. 1 Avtalan fevnir um allar limir hjá BLF, ið ynskja at gerast partur av avtaluni.

Stk. 2 Tá limir ynskja at gerast partur av avtaluni, skal limurin beinanvegin boða NordikPensjón frá hesum og senda inn allar neyðugar upplýsingar.

Stk. 3 Nýggir limir koma undir treytirnar í hesari avtaluni tá NordikPensjón hevur fingið allar neyðugar upplýsingar.

Stk. 4 Áðrenn NordikPensjón ger avtalu við persón um eftirlønar- og/ella tryggingaravtalu smb. hesi avtalu, skal BLF vátta, at viðkomandi persónur er limur í BLF.

Stk. 5 NordikPensjón sendir BLF fráboðan so hvørt limir tekna eftirlønar- og/ella tryggingaravtalu hjá NordikPensjón saman við einum samlaðum yvirliti yvir BLF-limir, ið hava gjørt slíka avtalu við NordikPensjón. BLF sendir NordikPensjón fráboðan um, at upplýsingarnir eru rættir. Harumframt sendir NordikPensjón eitt árligt yvirlit yvir allar limir, sum hava gjørt avtalu við NordikPensjón smb. hesum sáttmála.

**§ 4 Tá limir fara úr BLF**

Stk. 1 Tá limir fara úr BLF, sum hava gjørt eftirlønar- og/ella tryggingaravtalu við NordikPensjón, skal BLF beinanvegin boða NordikPensjón frá hesum.

Stk. 2 Tá limir, smb. § 3 stk. 1, fara úr BLF heldur <u>eftirlønaravtalan</u> fram fyri limin, um ikki onnur boð verða givin NordikPensjón. Tó verða gjøld og treytir frameftir broytt, so tey samsvara við gjøld og treytir fyri einstaklingar.

Stk. 3 Tá limir, smb. § 3 stk. 1, fara úr BLF heldur <u>tryggingaravtalan</u> fram til endan av tí ársfjóðringi ið limaskapurin heldur uppat. Limurin kann velja at halda fram við tryggingaravtaluni, við at gera sjálvstøðuga avtalu við NordikPensjón um hvussu tryggingaravtalan skal halda fram.

Avtalan skal verða gjørd innan 6 mánaðar frá at upprunaliga tryggingaravtalan fór úr gildið, og verða gjøld og treytir fyri tryggingarnar tá broytt, so tey samsvara við gjøld og treytir fyri einstaklingar.

Stk. 4 Um einstaklingatryggingin verður teknað sum beinleiðis framhald av tryggingini, sum limurin hevði gjøgnum BLF avtaluna, so krevst ongin heilsuváttan, og fulnaður verður veittur frá tekningardegnum. Verður einstaklingatryggingin teknað seinni, tó innanfyri 6 mánaðar freistina smb. § 4 stk. 3, so hevur tryggingin 3 mánaðar karenstíð.

## EFTIRLØN

### § 5 Eftirlønarkonto og Nordik PensjónsRøkt

Stk. 1 NordikPensjón stovnar eina eftirlønarkonto til teir limir hjá BLF, ið ynskja at gerast partur av avtaluni, har ið eftirlønargjøldini síðani verða goldin inn á.

Stk. 2 Eftirlønarlógin er galdandi fyri pensjónsuppsparing frá 1. januar 2014, meðan Rentutryggingarlógin er galdandi fyri pensjónsuppsparing undan 1. januar 2014.

Stk. 3 Limurin ger serstaka avtalu við NordikPensjón um Nordik Pensjónsrøkt, ið ber við sær, at serfrøðingar í NordikPensjón støðugt røkta eftirlønarsamansparingina smb. skjal 2, ið er partur av hesari avtalu. Pensjónin verður rentað við marknaðarrentu.

Stk. 4 Um starvsfólkið doyr áðrenn eftirlønin er útgoldin, verður eftirlønin útgoldin til næsta avvarandi. Næstu avvarandi eru í nevndu raðfylgju: hjúnafelagi, lívsarvingar, arvingar sambært testamenti, arvingar sambært lógini. Til ber at gera aðra avtalu við NordikPensjón um limurin starvsfólkið ynskir, at upphæddin við deyða skal gjaldast øðrum enn næsta avvarandi.

Stk. 5 Neyvari kunning um Nordik Pensjónsrøkt er at finna á www.nordikpensjon.fo. Upplýsingarnar kunnu eisini fáast við at venda sær beinleiðis til NordikPensjón.

## BÓLKALÍVSTRYGGINGAR

### § 6 Bólkalívstrygging

Stk. 1 Allir limir hjá BLF, ið ikki eru fyltir 51 ár og kunnu geva nøktandi heilsuváttan, kunnu tekna eina bólkalívstrygging. Áðrenn tryggingin verður sett í gildi, skal NordikLív hava móttikið og góðkent heilsuváttanina frá liminum.

Stk. 2 Lívstryggingin tryggjar teimum eftirsitandi eina upphædd um limurin doyr. Útgjaldið er tengt at aldrinum á tí, ið doyr, vísandi til skjal 1, sum er partur av hesum sáttmála.

Stk. 3 Lívstryggingin verður útgoldin til næsta avvarandi. Næstu avvarandi eru í nevndu raðfylgju: hjúnafelagi, sambúgvi, lívsarvingar, arvingar sambært testamenti, arvingar sambært lógini. Til ber at gera aðra avtalu við NordikPensjón um limurin ynskir, at upphæddin við deyða skal gjaldast øðrum enn næsta avvarandi.

Stk. 4 Neyvari kunning um bólkalívstrygging er at finna á www.nordikpensjon.fo.

Upplýsingarnar kunnu eisini fáast við at venda sær beinleiðis til NordikPensjón.

Stk. 5 Fyri at tekna eina bólkalívstrygging, smb. hesum sáttmála, er tað ein treyt, at felagslimurin hevur eina virkna pensjónsuppsparing hjá NordikPensjón smb. § 5.

**§ 7 Bráðsjúkutrygging**

Stk. 1 Allir limir hjá BLF, ið tekna eina bólkalívstrygging smb. hesum sáttmála, eru eisini fevndir av Bráðsjúkutryggingini, vísandi til skjal 1.

Stk. 2 Børn undir 18 ár hjá liminum og børn hjá hjúnafelaga/sambúgva hjá liminum eru eisini fevnd av tryggingini.

Stk. 3 Tryggingarupphæddin fyri Bráðsjúkutryggingina verður útgoldin um limurin fær staðfest eina av sjúkunum, ið sambært tryggingartreytunum geva rætt til fulnað, áðrenn limurin er fyltur 67 ár.

Stk. 4 Fyri Bráðsjúkutrygging hjá børnum gongur tryggingin út á 18 ára føðingardegi barnsins.

Stk. 5 Neyvari kunning um Bráðsjúkutrygging er at finna á www.nordikpensjon.fo.
Upplýsingarnar kunnu eisini fáast við at venda sær beinleiðis til NordikPensjón.

**§ 8 Tóm**

**§ 9 Tryggingarupphæddir, prísir og gjaldstreytir**

Stk. 1 Tryggingarupphæddir, prísir og gjaldstreytir v.m. eru ásett í skjali 1, ið er ein partur av hesari avtalu.

Stk. 2 Um tryggingar verða goldnar av eftirlønarkontuni sambært Eftirlønarlógini, kann í mesta lagið ein triðingur av árliga inngjaldinum fara til tryggingar. Restin skal fara til eftirlønarsamansparing.

**§ 10 Fráboðan**

Stk. 1 Um tryggjaði doyr, sendir NordikPensjón BLF fráboðan um hetta, og skal BLF skjótast gjørligt boða NordikPensjón frá um tryggjaði er limur í BLF.

**§ 11 Tryggingartreytir**

Stk. 1 Tryggingarnar sambært hesari avtaluni eru teknaðar í samstarvi við NordikLív.

Stk. 2 Tryggingarnar sambært hesari avtaluni gerast virknar tá NordikPensjón hevur fingið allar neyðugar upplýsingar, og treyta av nøktandi heilsustøðu, ið skal góðkennast av NordikLív.

Stk. 3 Tryggingarnar sambært hesari avtaluni eru teknaðar sambært galdandi tryggingartreytum hjá NordikLív, og eru hesar tryggingartreytir galdandi.

Stk. 4 NordikPensjón hevur altíð rætt til at skifta tryggingarveitara uttan at spyrja BLF.

Stk. 5 BLF fær boð um skift av tryggingarveitara í minsta lagið 1 mánaða áðrenn skifti verður framt, og kann tá uppsiga avtaluna til at fara úr gildið tá skifti fer fram. Uppsøgnin skal tó vera NordikPensjón í hendi í seinasta lagið eina viku áðrenn ætlaða skiftið.

**UNDIRSKRIFTIR**

Tórshavn, tann 12/7-2016

Búskapar- og tøgfrøðingafelag Føroya

Tórshavn, tann 12/7-2016

NordikPensjón

# SKJAL 1

## TRYGGINGARUPPHÆDDIR OG GJALDSTREYTIR
## BLF

**Bólkalívstrygging**
Lívstryggingin tryggjar teimum eftirsitandi eina upphædd um starvsfólkið doyr. Útgjaldið er tengt at aldrinum á tí, ið doyr, sum víst í talvuni niðanfyri.

| Tryggingarupphædd | |
|---|---|
| Aldur 18 ár til og við 50 ár | kr. 1.000.000 |
| Aldur 51 ár | kr. 950.000 |
| Aldur 52 ár | kr. 900.000 |
| Aldur 53 ár | kr. 850.000 |
| Aldur 54 ár | kr. 800.000 |
| Aldur 55 ár | kr. 750.000 |
| Aldur 56 ár | kr. 700.000 |
| Aldur 57 ár | kr. 650.000 |
| Aldur 58 ár | kr. 600.000 |
| Aldur 59 ár | kr. 550.000 |
| Aldur 60 ár til 66 ár | kr. 500.000 |
| Aldur 67 ár | kr. 0 |

**Bráðsjúkutrygging**
Bráðsjúkutryggingin verður útgoldin til limin um ein fær staðfest eina av ásettu sjúkunum í tryggingartreytunum fyri Bráðsjúkutrygging.

| Tryggingarupphædd | | |
|---|---|---|
| | Tryggjaði | Børn hjá tryggjaða |
| Upphædd | kr. 200.000 | kr. 120.000 |
| Aldur til og við | -66 ár | -17 ár |

Samlaði prísurin fyri báðar tryggingarnar er kr. 265,00 pr. mánað fyri hvønn lim í 2016.
Tryggingargjaldið verður goldið frammanundan hvønn mánað fyri ein mánað í senn.
Kostnaðurin fyri tryggingarnar verður tillagaður 1. januar í hvørjum ári.

**Treytir**
Tað er ein treyt fyri at tekna omanfyri nevnda tryggingarpakka, at ein er limur í BLF og at ein hevur eina virkna pensjónsskipan gjøgnum NordikPensjón.
Harumframt krevst góðkend heilsuváttan.



NordikPensjón – Oknarvegur 5 - 100 Tórshavn - Tlf. 330 330 - Fax. 316 950 - T-post: eftirlon@banknordik.fo - www.nordikpensjon.fo

# SKJAL 2

**Eftirlønarkonto og Nordik PensjónsRøkt**

**Nordik PensjónsRøkt**

NordikPensjón stovnar liminum eina Eftirlønarkonto og eina virðisbrævagoymslu, sum verða persónlig ogn hjá liminum.
Eftirlønaruppsparingin verður plasera í partabræva- og lánsbræva íløguprógv eftir persónliga íløguprofilinum hjá einstaka liminum.
NordikPensjón stovnar liminum ein Netbanka, har limurin bæði sær sína persónligu Eftirlønarkonto og sína persónligu virðisbrævagoymslu.
Tá ið ein virðisbrævahandil fer fram, fær limurin eina handilsnotu.
Primo januar og primo juli á hvørjum ári fær limurin eina persónliga avkastrapport frá NordikPensjón, umframt kunning um gongdina á marknaðinum og vánirnar fyri framman.
NordikPensjón røktar íløgurnar hjá liminum, sum merkir at íløgurnar støðugt fylgja tí íløguprofili, sum er avtalaður við einstaka limin.

**Avkast**

Niðanfyri sæst eitt 5 ára yvirlit yvir søgulig avkast av íløgutilmæli bankans fyri teir 3 váðabólkarnar.

| Íløgutilmæli pensjón | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Lágan váða | Miðal váða | Hogan váða | | Lágan váða | Miðal váða | Hogan váða |
| Indeks | 2009 | 100 | 100 | 100 | Avkast | | | |
| | 2010 | 112,54 | 121,65 | 126,59 | | 12,54 | 21,65 | 26,59 |
| | 2011 | 115,03 | 117,93 | 116,92 | | 2,21 | -3,06 | -7,64 |
| | 2012 | 122,34 | 136,12 | 134,91 | | 6,36 | 15,43 | 15,39 |
| | 2013 | 131,62 | 152,46 | 161,61 | | 7,58 | 12,00 | 19,79 |
| | 2014 | 142,16 | 170,54 | 184,29 | | 8,01 | 11,86 | 14,03 |
| | 2015 | 150,57 | 185,46 | 208,94 | | 5,92 | 8,75 | 13,38 |

**Umsitingargjald av pensjónsuppsparing**

Limir hjá BLF, sum gera avtalu við NordikPensjón um røkt av pensjónsuppsparing, skulu ikki gjalda eitt fast árligt umsitingargjaldi til NordikPensjón fyri pensjónsrøktina, eiheldur handilskostnað tá ið virðisbrøv verða keypt ella seld.

**Provisjón til NordikPensjón**

NordikPensjón móttekur provisjón frá teimum íløgufeløgum, sum NordikPensjón samstarvar við. Provisjónin er ymisk fyri partabræva íløguprógv og fyri lánsbræva íløguprógv. Miðal provisjónin fyri eina vanliga uppsparing er uml. 0,50% – 0,75% árliga. Avkastið, sum limurin sær í síni persónligu avkastrapport, er aftaná íløgukostnaðin.



NordikPensjón – Oknarvegur 5 - 100 Tórshavn - Tlf. 330 330 - Fax. 316 950 - T-post: eftirlon@banknordik.fo - www.nordikpensjon.fo